


**Nr. 23** *6. november 2022* **82. árg.**

# Sorg

*„Og sum hann kom gangandi framvið, sá hann Levi, son Alfeusar, sitandi við tollbúðina, og hann sigur við hann:* **»Fylg mær!«** *Og hann reisti seg upp og fylgdi honum.“ Mark. 2,14.*

Vit áttu fimm børn, fýra gentur og ein drong, Kaj. Tá ið hann var seytjan ár, doyði hann av einari ferðsluvanlukku. Hann koyrdi á prutli, og vanlukkan hendi so at siga í túninum hjá okkum.

Tað oyðilegði meg so púra. Kaj var ein sovorðin fittur og góður drongur. Vit høvdu ongantíð havt trupulleikar av honum. Hann gekk runt og hjálpti øllum, ja, hann var av sonnum ein sólstrála í heimi okkara.

Eg dugi ikki at siga frá tí sorg og pínu, sum eg bar í hjarta mínum. Eg orkaði ikki at koma víðari, eg var fullkomiliga knúst.

Ein dagin lá eg á køksgólvinum og rópti á Gud: „Harri, nú mást tú hjálpa mær. Eg orki ikki longur. Hví í verðini skuldi hetta henda? Tað tykist so meiningsleyst.“

Tá hoyrdi eg klárt og týðiliga eina rødd, sum tosaði uttanífrá og inn gjøgnum oyrað á mær: „Kaj er hjá mær. Men kom tú og fylg mær!“

Tá gjørdist eg rættiliga kløkk. Sakin var nevniliga tann, at eg hevði í seinastuni sett dyrnar út til verðina á glopp. Nú talaði Harrin til mín og segði við meg eins og við Levi á sinni: „Fylg mær!“ (Mark. 2,14).

Harrin sær alt. Tað liggur bert og opið fyri honum. Vit kunnu ikki halta til báðar síður. Tann smali vegurin er av sonnum smalur. Har er ikki rúm fyri eyka viðføri. Alt slíkt mugu vit

seta frá okkum. Eg skal siga tær, at eg smekkaði hasar dyrnar til verðina aftur, og nú er hon læst med alla. Nú gongur tað bara ein veg, og tað er frameftir og uppeftir.

*Lise Karlsen, Visjon Norge – Effie Campbell.*

# Lívið

Mong fólk nú á døgum eru so ørkymlað og ráðleys. Tey renna higar og hagar sum fluga í fløsku og hava einki mið ella mál. Tey vita ikki, hvaðani tey eru komin, ella hvagar tey fara. Lívið hjá teimum hevur einki endamál. Tey eru døpur í huga, deprimerað. So fylla tey seg við nervatablettum. Men tað ger tey einki petti eydnusamari.

Jesus kemur við einum framúrskarandi tilboði: „Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu." (Matt. 11,28).

Tað síðsta, Jesus gjørdi, var at breiða armarnar út. Hansara favnur er nóg stórur til øll. Hann doyði við útbreiddum ørmum, og hann bjóðar øllum at koma til sín. Tá ið hann sigur „øll", so meinar hann øll, og ikki fimta hvønn ella tíggjunda hvønn, ella tey, sum eru so fitt og góð. Hann leitar eftir tær og vil frelsa teg. Veitst tú, hvat ið fyrsti spurningur í Bíbliuni er? „Ádam, hvar ert tú?" (1. Mós. 3,9). Og handa spurningin setur Jesus framvegis.

Tey, sum taka av tilboðnum, verða ikki vónsvikin, tí tá fær lívið eitt innihald og eitt endamál. Veitst tú hví? Tí at Jesus er sjálvt Lívið. „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið," sigur hann. (Jóh. 14,6). Hann gevur okkum eitt spildurnýtt lív, eitt lív við stóra L. „Tí, um onkur er í Kristi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt." (2. Kor. 5,17). Ljóðar tað ikki gott at sleppa at byrja heilt av nýggjum?

At koma til Jesus er at bjóða honum inn í hjartað. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara." Jóh. 1,12.

Tá ið vit verða frelst, so er tað ikki tað sama sum, at nú gongur alt sum eftir ánni, nú eru eingir trupulleikar longur. Tað eru tað, tí henda verð er so súrgað av syndini. Men ein munur er, sum tey trúgvandi hava. Tey eiga ein so undurfullan frið í hjartanum, hóast umstøðurnar ikki eru góðar, og tey vita

eisini, hvagar tey skulu fara við teirra trupulleikum, nevniliga til hann, sum eigur alt valdið í himli og á jørð til at hjálpa.

Harafturat vita tey trúgvandi, at tað besta liggur fyri framman. Jesus elskar okkum. Hann hevur givið sítt lív fyri okkum. Tí eru vit so glað. Nú er tað bara ein vegur fyri okkum, og tað er frameftir og uppeftir. Tá ið vit doyggja, fara vit spákandi inn gjøgnum perluportrið, tí vit hava Jesus í hjartanum, og hann er sjálvur vegurin hagar.

Æra skal Gud og Lambið verða, at Hann lutar sín Golgatasigur við okkum smáu menniskju, so at tað er møguligt hjá okkum at fara spákandi inn gjøgnum perluportrið og heim í tann bústaðin, sum Jesus hevur fyrireikað til hvønn einstakan okkara.

*Effie Campbell.*

# Jesus vil hjálpa tær

*Ludvig Karlsen*

*„Kalla á Meg, tann dag tú ert í neyð – Eg skal hjálpa tær, og tú skalt prísa Mær.“ Sálm. 50,15. (V.D. ums.)*

Tann Gud, sum hevur alla makt í himli og á jørð, sigur hesi orð við teg í dag, og kanska er tað júst í dag, at tú hevur tørv á at fáa at vita hetta. Nú minni eg teg á, at tú hevur ein at fara til við tíni neyð, uttan mun til, hvør ið neyðin er.

Kanska ert tú einslig, ella tú ert sjúk. Kann vera, at børn tíni ella hjúnafelagin hava trupulleikar. Møguliga hevur tú bústaðartrupulleikar, ella at tíni fíggjarviðurskifti eru vánalig, ella stríðist tú við tína gudstrúgv?

Einki er ov lítið ella ov stórt at fara til Jesus við; men tað er ikki altíð, at loysnin á tínum trupulleikum kemur beinanvegin. Kortini byrjar okkurt at henda, tá ið vit stíga fram fyri Gud í Jesu navni og biðja um hjálp og vísdóm at loysa okkara trupulleikar.

Tað ber á, at Hann sendir hjálpina, sum okkum tørvar, gjøgnum onnur menniskju, ella at Hann brúkar neyðina til besta fyri okkum. Kanska brúkar Hann okkara neyðstøðu at minna okkum á bønarinnar megi. Hann minnir okkum á, at vit mugu hava okkara bønarlív í ordan!

Ofta verður sagt, at neyðartíðir eru Guds tíðir, og Bíblian sigur okkum, at tann, sum biður, hann skal fáa, og bønarsvarið kemur, so satt sum vit ikki møðast og gevast. Eg kenni eina

mammu, sum hevði biðið í 40 ár, at sonurin mátti blíva frelstur, og ein dag kom bønarsvarið. Tað var vorðið ein vani hjá henni at biðja fyri honum, og á øllum møtum, sum hon var á, bað hon um forbøn fyri soni sínum. Henda mamman var, sum frá leið, vorðin gomul, og minnið var farið at bila. Drongurin var blivin vaksin maður; men Gud svaraði kortini upp á bønina!

Kalla á Hann í dag og legg alla neyð tína fram fyri Hann, sum hevur umsorgan fyri tær.

Onkur hevur sagt, at kallinummarið ella neyðnummarið upp til Guds er Sálmur 50,15, fyri at vit betur skulu minnast tað. Altso Harrin bjóðar tær og sigur: „Kalla á Meg, tann dag tú ert í neyð – Eg skal hjálpa tær, og tú skalt prísa Mær."

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað, sum vit fylla okkum við dagliga, kemur at ávirka okkara hug og hjarta. Vit kunnu ikki liva eitt dupult lív, har vit viðhvørt liva saman við Jesusi og aðrar tíðir liva, sum okkum lystir. Bíblian er greið. Vit kunnu ikki tæna tveimum harrum.

*e.c.* ums.

---

Nógvir ungdómar stríðast sálarliga. Hugsa tær, um teir vistu, hvørjir teir eru, og hvørjar stórar tankar, ið Gud hugsar um teir. Tað er nakað, sum er rænt frá teimum. Í Jeremia 1,5 stendur, at áðrenn Hann myndaði okkum í búkinum á mammu okkara, kendi Hann okkum.

*e.c.* ums.

---

Lykilin at vinna menniskju kring okkum er ikki at prestar og trúboðarar gerast dugnaligari, men at alt Guds fólk skilir, hvat ið vit eiga í evangeliinum og kann geva tað víðari einfalt og sannførandi.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6. nov. | **Tekstur:** | Matt. 25,1-13 | **Bíbliuorð:** | Matt. 25,13 |
| 13. nov. | **Tekstur:** | 2. Mós. 2,1-10 | **Bíbliuorð:** | Jer. 29,11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 24** ***20. november 2022*** **82. árg.**

# Hvat er vorðið av vekingarrópinum?

Bíblian sigur greitt frá, at áðrenn Jesus kemur aftur, fer at koma eitt stórt fráfall frá konservativari, kristnari trúgv.

Alt, sum hevur við kristna trúgv og moral at gera, er í ferð við at verða burturbeint úr okkara samfelagi. Nógvar kirkjur og samkomur eru um at fara sundur. Fyri frið skyld leggja kristnir leiðarar seg flatar fyri antikristiliga andanum. Teir orka ikki at standa ímóti tí støðugt vaksandi trýstinum og jagstranini og góðtaka tí so við og við ranglæru viðvíkjandi bíbilskari trúgv, lív og læru. Hetta er eitt av teknunum um endatíðina.

Áðrenn Antikrist stígur fram, verður samfelagið fyrireikað til komu hansara. Tí sigur Paulus: „Latið ongan villa tykkum á nakran hátt; tí at FYRST má fráfallið koma, og syndarinnar maðurin (lógloysismaðurin, Antikrist) verða opinberaður, glatunnar sonurin.“ 2. Tess. 2,3. Síðani fer hetta fram: „Tí loynimálið í lógloysinum er longu farið at virka, bert at tann, sum nú heldur aftur (tey Jesus-trúgvandi), verður beindur burtur av vegnum; og TÁ skal lógloysingurin verða opinberaður.“ (2. Tess. 2,7„8). Paulus tíðarfestir burturrykkingina og sigur, at hon kemur, ÁÐRENN Antikrist stígur fram.

Sambært Jesusi skulu vit vera „salt jarðarinnar“ og „ljós heimsins“ (Matt. 5,13„14). Vit skulu vísa vegin til Frelsaran, og vit skulu bremsa og forða rotinum í samfelagnum. Rotið stendst av ranglæru og brot á Guds lóg. Flóta vit við streyminum sum ein deyður fiskur, ella **standa vit ímóti trýstinum** og vísa, at vit eiga lívið í Gudi?

Jesus kemur brádliga og óvæntað: „Men um midnátt kom róp í: „Sí, nú kemur brúðgómurin! Farið út at møta honum!“

(Matt. 25,6). Hvat er vorðið av vekingarrópinum – boðanini um afturkomu Jesusar í okkara meinigheitum? Bara 10% av dagsins prædikumonnum tala um afturkomu Jesusar. Profetiini um komu Jesusar eru eggjandi, og tey vekja okkum upp og fáa okkum at hugsa okkum um. Bíblian er ein profetisk bók.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tað er ongastaðni, at vit kunnu lata frið falla á okkum

Soleiðis ljóða orðini hjá einum professara í kliniskari mikrobiologi á „Syddansk Universitet“. Hetta segði hann í samband við, at koronatølini vaksa. Professarin er ein klókur maður; men hann hevur enn okkurt at læra.

Vit Jesus-trúgvandi kunnu siga honum, at tað ER eitt stað, har vit kunnu lata frið falla á okkum: Í KRISTUSI!

Latið lív okkara, við og uttan orð, vera ein boðskap til heimin, at TAÐ ER EITT STAÐ, HAR VIT KUNNU LATA FRIÐ FALLA Á OKKUM – UTTAN MUN TIL HVAT IÐ HENDIR.

***Sálmur 91,1–2:***

Tann, ið situr í lívd hins Hægsta og býr í skugga hins Alvalda, sigur við Harran: „SKJÓL mítt, borg mín, Gud mín, **sum eg líti á**.“

***Sálmur 36,8:***

„Hvussu dýrmæt er ikki NÁÐI Tín, Gud! Menniskjabørnini SØKJA sær SKJÓL í veingjaskugga Tínum.“

***Sálmur 32,7:***

„Tú ert SKJÓL mítt! Tú fríar meg úr trongd. Frelsufagnað letur Tú vera rundan um meg.“

***Sálmur 62,6–9:***

”Bíða í kvirru, sál mín, Gudi, vón mín kemur frá honum! Eina hann er mín klettur, mín frelsa, mín BORG, eg skal ikki VIKAST. Hjá Gudi er hjálp mín og æra mín, mín fasti klettur, mín VERND er Gud. Lítið á hann, fólk, á hvørji tíð, oysið út tykkara hjørtu fyri honum, okkum Gud er VERND.“

Professarin veit um kliniska mikrobiologi, og tað er gott. Men tað er uppaftur betri at kenna GUD sum okkara …

SKÝLI – VERND – SKJØLDUR – FRIÐSKJÓL – GOYMISTAÐ!

Tí tað er í honum, vit lata frið falla á okkum í ófriðarligum tíðum! Tað er í Kristusi, at vit raka við friðin, **sum ber av øllum viti**!

Eg sigi nei til alla stúran og angist – av tí at eg sigi ja til Jesus.

*Effie Campbell* umsetti.

# Báðir synirnir hjá pápanum

*Sten Sørensen, blaðstjóri*

Ein av kendastu tekstunum í Bíbliuni er frásøgnin um burturvilsta sonin í Lukas 15.

Sonurin tók ógvisligar og óvanligar avgerðir og tók út faðirarvin, hóast faðirin livdi enn. Hann fór avstað og ætlaði sær ongantíð at koma aftur. Hetta var púra burturvið, so leingi sum pápin enn var á lívi. Men pápin mátti tíverri lata hann fara.

Eftir at hava dvølt uttanlands, har hann hevði brúkt allar pengarnar, og har hann at enda át grísamat, gekk hann í seg sjálvan og fór heim at spyrja, um hann kundi sleppa at vera ein tænari hjá pápanum.

Heima á garði var hin sonurin. Hann var eldri. Tað er ikki talað ella skrivað so nógv um hann. Men hansara hugburður og atferð hevur eisini ein boðskap til okkara. Tí hyggja vit gjøllari eftir soninum, sum búði heima, síggja vit, at pápin, tá ið samanum kom, hevði tveir synir, sum vóru glidnir burtur frá honum. Annar var komin burtur frá pápanum har langt úti í verðini. Hin var komin burtur frá pápanum, meðan hann var heima á garði. Báðir vóru glidnir burtur frá pápanum.

Eftir sum yngri sonurin er so nógv umtalaður, seti eg ljóskastaran á heimastadda sonin: Tað ber til at ganga í kirkju og kortini hava frástøðu frá Gudi: Vit kunnu vera so bundin av andaligum virksemi og kortini missa sambandið við Jesus.

Hin heimastaddi sonurin sá ikki, hvat ið hann longu hevði heima. Pápin var bara blivin ein arbeiðsgevari. Pápa-sonar sambandið var burtur, alt tað hjartaliga og kærleiksfulla sambandið. Sonurin var nær, men kortini langt burtur. Sum tað var syndarligt.

Sonurin kundi havt livað Harrans glaðu dagar í vissuni um, „at tú ert altíð hjá mær, og alt mítt er títt“. Tú, sum gongur í kirkju

og altíð hevur gjørt tað, miss ikki tað tætta faðirsambandið. Gud elskar teg og veit um alt tað góða, tú hevur gjørt. Hann setir prís upp á tað. Men Gud vil hava tín kærleika og nærleika. Miss hann ikki úr eygsjón mitt í meinigheitini.

Tveir av lærusveinunum søgdu Jesusi farvæl, tá ið teir hildu, at nú var liðugt við honum. Teir vóru á veg til Emmaus. So kemur Jesus sjálvur har og gerst partur av ferðalagnum. Frástøðan bleiv til nærleika. Hjartað í teimum brann, tá ið hann breyt breyðið og læt Skriftirnar upp fyri teimum. Tað liggur okkurt gott og signað í Jesu nærveru – og tá ið Skriftirnar gerast livandi fyri okkum. Tað skapar nærleika og gevur barnakor! Minst nú til tað: Vit eru synir og døtur, ikki trælir!

*Effie Campbell* umsetti.

# Grundvøllurin undir gleðini

Himmalin er hin óvikandi grundvøllurin, har øll gleði kemur frá. Einglarnir róptu av gleði, tá ið jørðin varð skapað. Job 38,7. Einglarnir boðaðu gleðina við Jesu føðing. Luk. 2,10. Tað er gleði í himli um ein syndara, sum vendir um. Luk. 15,7.

Himmalin vil vera fyltur við gleði, og hugsa tær, hvørji undurfull orð ein dag fara at møta okkum: „Far inn til gleði Harra tíns." Matt. 25,21.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit kunnu ikki vera sonn kristin, um vit ikki gera, sum Bíblian áleggur okkum viðvíkjandi Ísrael: Vit skulu troysta Ísrael og vera varðmenn á borgargørðum teirra. (Jes. 40,1 og 62,6).

*e.c.* ums.

---

Uttan umvending og nýtt lív í Kristusi er tað ógjørligt at skilja tíðina. Vit vita ikki so frægt sum, hvaðani vit koma, hvørji vit eru, ella hvar leiðin liggur.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 20. nov. | **Tekstur:** | 2. Mós. 3, 1-14 | **Bíbliuorð:** | 2. Mós. 3,12 |
| 27. nov. | **Tekstur:** | 2. Mós. 4, 1-17 + 12,28-40 | **Bíbliuorð:** | 2. Mós. 12,13 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74